Næmingar úr Suðri vitja Sosialin:

# Smyril er kuul

**Fimti flokkur úr Trongisvágsskúla kom mánamorgunin á útferð til Havnar at stuttleika sær og royna nýggja Smyril. Børnini eru sera væl nøgd við stásiliga farið og siga, at Smyril er kuul**

*Birita W. Djurhuus*
*Hanus H. Eysturdal*
*praktikantar*



Næmingar úr fimta flokki í Trongisvágsskúla vitja í Miðlahúsinum



Lítlibeiggi slapp við til Havnar og hann og leyvan í Trappuni í Tórsgøtu gjørdust skjótt góðir vinir

Mánamorgun 7. november var ein fimti flokkur á gátt í Miðlahúsinum. Tað var fimti flokkur úr Trongisvágskúla. Tey vóru komin ein túr til Havnar við nýggja Smyrli.

Børnini greiða frá, at planurin er eisini at fara niðan í Gundadal at bowla og svimja, og kl 19 gongur leiðin síðani niðan í Norðlandahúsið, har tey fara at hyggja eftir Ronju Ránsmansdóttur, og tey gleða seg óført.

Týsmorgnin varð so farið heim aftur til Suðuroyar. Tá spurt verður, hvussu tann nýggi Smyril roynist, svara tey øll somul. at Smyril er kuul. Hann rullar slettis ikki, og eisini er kúlubað at spæla sær í. Hann er nógv betur enn tann gamli, siga børnini úr Trongisvágsskúla.



Birita og Hanus, praktikantar práta við næmingar úr Suðuroy




Altjóða góðkend útbúgving til skipara og skipsførara,
sum gevur vinnumøguleikar á sjógvi og landi um allan heim.
Føroya Sjómannsskúli er ein nútímans skúli við serkønum lærarum í øllum lærugreinum, eins og skúlin hevur allar teir hentleikar og útbúnað, sum skulu til fyri at gera útbúgvingina góða og áhugaverda.

**Skipsførari**
**Skipsføraraútbúgvingin tekur 3 ár, 3 semestur til skipara og síðani 3 semestur til skipsførara. Skúlin byrjar 3. januar 2006.**

**Skipari**
**Skiparaútbúgvingin tekur hálvtannað ár. Tá ið tú hevur staðið skipara, kanst tú fara beinleiðis til skipsførara. Skúlin byrjar 3. januar 2006.**

Næmingar verða tiknir inn til báðar útbúgvingarnar 2 ferðir um árið.

Tilmeldingarskjal fæst við at ringja til skúlan og á heimasíðu okkara.

*Útbúgvingarnar á Føroya Sjómannsskúla eru góðkendar av Føroya Landsstýri, Søfartsstyrelsen og IMO.*

Føroya Sjómansskúli
Maritime College

Nóatún 2, Postboks 104, 110 Tórshavn

Tel 35 75 00, Fax 35 75 02,farnav@farnav.fo, www.farnav.fo




Maskinmeistaraútbúgvingin er mest fjølbroytta, hægri yrkisútbúgving, sum kann fáast í Føroyum. Hon gevur sera stórar møguleikar bæði á sjógvi og ikki minst á landi, líkamikið um tað er í Føroyum ella úti í heimi. Eisini í oljuvinnuni eru maskinmeistarar størsti einstaki yrkisbólkur.
Útbúgvingarnar eru moduluppbygdar. Lesturin til maskinmeistara tekur 3 ár.

**Maskinmeistari**
**Upptøka til maskinmeistaraútbúgvingina er tvær ferðir um árið. Skúlin byrjar 3. januar 2006.**

**Maskinist**
**Upptøka til maskinistútbúgvingina er einaferð um árið. Maskinistútbúgvingin byrjar aftur í august mánaði.**

Hevur tú hug at gerast maskinmeistari ella maskinistur, so kanst tú seta teg í samband við skúlan, so senda vit tær upplýsingar um upptøkutreytir og lesturin saman við umsóknarblaðnum.
Ring, send eitt bræv, ein teldupost ella far inn á okkara heimasíðu - www.mec.fo, har tú finnur umsóknarbløð.

*Útbúgvingarnar á Maskinmeistaraskúlanum eru góðkendar av Føroya Landsstýri, Søfartsstyrelsen og IMO.*

MASKINMEISTARASKÚLIN
Undir krákugjógv 5, 110 Tórshavn
Tel 350 250, Fax 350 251,
E-mail:mms@mec.fo, Heimasíða:www.mec.fo